# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

# Dia Ellindson fyllir seksti

Leygardagin 6. oktober fyllir Dia Ellindson, ættaður úr Æðuvík, búsitandi í Runavík, seksti ár. Hann er sonur Ellender Davidsen, róptur Ellindur og Súsonnu, rópt Sanna. Bæði vóru ættað úr Æðuvík.

Dia er elstur av fimm núlivandi systkjum. Foreldrini mistu okkurt barnið undir føðing ella beint eftir, og tá ið Dia var føddur, var hann eisini ógvuliga sjúkur. Kortini var hann so mikið seigur, at hann kom undan.

Dia var soleiðis sjúkur heilt frá barnsbeini av, og tað gekk rættiliga leingi, áðrenn tey funnu út av, hvat var galið.

Umsíðir komu læknarnir fram til, at hann hevði hol í millumgøgnini. Dia noyddist niður á Ríkissjúkrahúsið, har hann fekk stóra skurðviðgerð. Undan viðgerðini hevði hann tað ikki gott og var nógv sjúkur.

Dia fekk soleiðis ongan serligan start í lívinum, men eftir skurðviðgerðina gjørdist hann nógv betri fyri og kundi fara til arbeiðis.

Longu sum 15 ára gamalur fór hann at rógva út við Morging Star. Har var hann fýra túrar. Hann var ringur av sjóverki, og hóast hann eisini var á sild við Vesturhavinum Blíða og seinni við ymiskum farmaskipum og ferðamannaskipinum Tjaldrinum, slapp hann ongantíð av við sjóverkin.

Dia hevur havt ymiskt fyrifallandi arbeiði á landi, eisini millum túrar. Hann hevur arbeitt hjá kommunu, Landsverki, SEV og Bakkafrost á Glyvrum.

Seinasta arbeiðsplássið hjá honum var á Røktar-og Ellisheiminum í Runavík. Har arbeiddi hann í 11 ár út í eitt. Hetta var frá miðskeiðis í áttatiárunum til miðskeiðis í nítiárunum. Øll árini starvaðist hann í køkinum sum hjálparfólk, og hetta dámdi honum sera væl.

Hann hevur mangan sagt, at hetta var ein góð tíð.

Dia gekk í barnaskúla í Æðuvík, men tá skúlin varð niðurlagdur síðst í fimtiárunum, flutti hann heim á Toftir at ganga í skúla.

Sum ungur var hann á Føroya Fólkaháskúla, og seinni var hann eisini á einum háskúla á Jútlandi.

Sjálvur hevur Dia sagt, at háskúlatíðin var ein ógvuliga góð tíð hjá honum. Um hetta mundið minnist hann serliga, tá ið sjómarkið varð flutt út á 12 fjórðingar á grækarismessu í 1964.

Veturin 1977/1978 gekk hann á kokkaskúla í Klaksvík, og eitt stutt skifti gekk hann eisini á slaktaraskúla í Roskilde í Danmark.

Men slaktari bleiv hann ongantíð.

Dia hevur altíð havt stóran áhuga fyri samfelagsviðurskiftum, og hann er tjóðskaparsinnaður um ein háls. Um vetrarnar er hann aktivur í Eysturoyar Dansifelag, har hann eisini skipar onkra vísu.

Nú Dia fyllir seksti í morgin, fara vit at ynskja honum hjartaliga tillukku við degnum, samstundis sum vit ynskja honum og øllum gestum hansara eitt minniligt kvøld í Sjókaféini í Runavík leygarkvøldið 20. oktober.

Tey, ið ynskja at gleða Dia, tá hann heldur seksti ára føðingardagin, kunnu tekna seg á tlf. 268296 ella 448204 í seinasta lagi 16. oktober.

**-vilmund.**



*Dia, sum í morgin fyllir seksti, hevur stóran áhuga fyri samfelagsviðurskiftum, og hann er tjóðskaparmaður um ein háls*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

†

## Andlát og jarðarferðir

Minningarhald verður við urnina hjá **Claus Amundsen** leygardagin klokkan 13 í Kirkjugarðskapellinum. Tey, ið vilja minnast Claus, kunnu lata børnunum eina gávu. Konta í Suðuroyar Sparikassa.

Jarðarferðin hjá **Sofus í Selvindi** verður úr Sjóar kirkju leygardagin klokkan 13. Tey, ið vilja minnast Sofus, kunnu lata eina peningagávu til nýtt missiónshús á Strondum, konta í peningastovninum.

**Heðin Müller**, ættaður úr Vági, búsitandi í Humlebæk, andaðist týsdagin 69 ára gamal. Jarðarferðin verður leygardagin kl 12 úr Humlebæk kirkju.

**Leivur Clementsen** fer til gravar úr Skopunar kirkju leygardagin klokkan 12. Sungið verður úr sálmabókini.

**Dagurin**

**6. oktober. Broderus.** Ókent halgimenni.

**7. oktober. Amalia.** Teir vita um onga halgikvinnu við hesum navni, men navnið er einaferð komið í álmanakkan í staðin fyri Birgitta, ið helst er Birgitta úr Vadstena í Svøríki (1302-1373).

**8. oktober. Ingibjørg.** Helst gamla navnið Ingiburgh, men eingin veit hví tað er komið í álmanakkan.

**Prógv**

Durita Mortensen, Trongisvágur, hevur 27. august 2007 fingið prógv sum cand. pharm., frá Københavns Universitet, Det Pharmaceutiske Fakultet.

# Tøkk

Hjartaliga takka vit tykkum øllum, sum sýndu samkenslu, tá mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Christina Helena Debes**
Tórshavn

andaðist og varð jarðað.
Takk fyri blómur og kransar og tøkk til tykkum, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.
Tøkk til tykkum, sum hjálptu til við jarðarferðina og ervi.
Serstaka tøkk til starvsfólk á Nærverkinum, Ellisheiminum og Heimið við Vallalíð.

*Familjunnar vegna*
**Fróði, Laurits, Niclas og Pauli**

# Tøkk

Hjartaliga takka vit tykkum øllum, sum á ymiskan hátt sýndu samkenslu, tá okkara elskaði maður, pápi, verpápi og abbi

**Rólant Høgnesen**

gjørdist sjúkur, doyði og varð jarðaður.
Tøkk fyri blómur, kransar, heilsanir og peningagávu til Føroya Felag móti krabbameini.
Eisini takka vit tykkum, sum á ymiskan hátt hjálptu, stuðlaðu og vitjaðu Rólant, meðan hann var sjúkur.
Tøkk øll tit, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Jóngerð**
**Anna, Carl og Egin**

†

**Jarðarferð**

Minningarhald verður við urnuna hjá

**Claus Amondsen**

leygardagin kl. 13.00 í Kirkjugarðskapellinum.

*Fyri tey avvarandi*
**Lisa Hendriksdóttir**

Tey, ið vilja minnast Claus, kunnu lata børnunum eina peningagávu, konta í Suðuroyar Sparikassa, 9870-102.604.7